## Claus tapti aftur

Blackpool hevur nú tapt tveir dystir á rað í triðbestu ensku fótbóltsdeildini. Leygardagin hevði Blackpool vitjan av Bristol City, og gestirnir skoraðu einasta málið í dystinum stutt eftir hálvleikssteðgin. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen kom á vøllin, tá ið 78 minuttir vóru spældir, men hann kundi einki broyta við úrslitinum. Blackpool liggur nú nummar 8 av 24 liðum í League One.



## Atli spældi í ein tíma

Leygardagin spældi danska 1. deildarliðið Frem venjingardyst ímóti FC Roskilde. Dysturin endaði við 3-2 sigri til Frem. Føroyski landsliðsspælarin Atli Danielsen var á vøllinum frá byrjan. Hann spældi á miðvøllinum. Frem legði seg fram um 3-0 eftir 56 minuttir. Fýra minuttir seinni varð Atli Danielsen skiftur út. Eftir hetta skoraði Roskilde tvær ferðir. Gunnar Nielsen var eisini á vøllinum. Hann spældi fyrra hálvleik og helt málið reint.

## Ótrúliga stórt

Gleðin var ikki til at taka feil av hjá leikarunum hjá Drátti, tá tær vunnu sín fyrsta steypasigur nakrantíð. Eftir dystin fingu vit orðið á Helgu Nordendal hjá Drátti, sum var ein av mest eyðsýndu leikarunum á vøllinum henda dagin. Hon var ótrúliga glað fyri sigurin.

- Hetta er super. Vit hava verið í finaluni fýra ferðir áður og høvdu ikki vunnið hana áður, so nú var uppppá tíðina at vinna finaluna. Dysturin var sum heild sera skiftandi, men í síðsta setti var, sum tað skuldi vera, og tíbetur vunna vit dystin.

Helga helt tó, at leikararnir hjá Drátti gjørdu tað óneyðuga spennandi í síðsta og avgerandi settinum.

- Vit føra trygt í fimta setti, og tá man er so langt frammanfyri, so følir man, at hetta nokk skal ganga, og so byrjar man at slappa av. Tær kempa eisini ótrúliga væl, og munurin á liðunum er næstan eingin. Vit hildi tó tørn og vunnu. Hetta er tað størsta, man kann vinna í føroyskum flogólti, og karmarnir vóru heilt ótrúliga góðir, staðfesti Helga at enda.

**-teitur**

## Allar eru tendraðar



*Í fjórðu royndini eydnaðist tað. Dráttur kann løksins rópa seg steypavinnari í kvinnuflogbólti*

*Mynd: Álvur*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð eydnaðist Drátti at vinna eina steypafinalu í kvinnuflogbólti, og leikararnir vóru sum vera man ovurfegnir. Eftir dystin fingu vit orðið á Sólgerð Henriksen hjá Drátti. Hon helt, at alir leikararnir vóru klárir til dystin henda dagin.

- Hetta var heilt fantastiskt. Allir leikararnir eru virkiliga klárir á vøllinum í dag, og eg haldi, at allar stríðast um hvønn bólt, tí vinna vit dystin. Spælið hjá okkum gongir eisini rættiliga væl, móttøkurnar eru góðar, og tá verður so nógv lættari at spæla. Tað hevur eisini ótrúliga nógv at siga, at vit megna at koma aftur. Vit eru aftanfyri bæði 1-0 og 2-1, men í báðum førum koma vit aftur, og tað er ótrúliga væl kempað.

Sólgerð helt tó eisini, at rutinan hevði nakað at siga í dystinum leygardagin.

- Vit hava roynt at verið í steypafinaluni tríggjar ferðir fyrr, og eg haldi, at vit dugdu betri at standa ímóti trýstinum í dag. Vit hava royndirnar, og í dag komu tær okkum til góðar. Vit koma eisini aftur, og hetta vísir, at viljin hjá okkum var til staðar í dag, segði ein stórsmílandi Sólgerð Henriksen eftir dystin.

**-teitur**

Dráttur-KÍF 3-2 (19-25, 25-19, 21-25, 25-8, 15-13):

# Fjórðu ferð eydnaðist

**Dráttur gjørdist steypavinnari í kvinnuflogbólti eftir ein sera javnan og spennandi finaludyst ímóti KÍF, har spenningurin helt sær líka til síðsta bólt. Eftir trý tap í undanfarnum finalum eydnaðist endiliga Drátti at fáa sín steypasigur**

FLOGÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




Nógv fólk var komið saman í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin, tá ið steypafinalur í flogbólti vóru á skránni. Fyrri dysturin henda dagin var steypafinalan hjá kvinnum millum Drátt og KÍF, og longu ein tíma undan dystinum var høllin meir enn hálvfull.

Kvinnurnar hjá Drátti kundu ikki sigast at vera óvanar við steypafinalur undan dystinum. Heili tríggjar ferðir áður høvdu tær verið partur av steypafinalunum, men hvørja ferð máttu tær fara av vøllinum sum taparar.

Hjá KÍF var tó heldur øðrvísi. Tær høvdu ongantíð verið í hesi støðu undan finaludystinum leygardagin, so hetta var teirra elddópur í steypahøpi. Gongdin hjá kvinnunum úr Kollafirði hevði tó verið avbera góð í landskappingini undan steypafinaluni. Síðstu fimm royndirnar høvdu givið fýra sigrar, og m.a. hevði KÍF vunnið ein rættiliga tryggan sigur ímóti júst Drátti í hesum dystunum, so vónirnar vóru góðar hjá kollfirðingum.

Hjá Drátti hevði ikki gingið so væl hjá sum hjá KÍF síðstu dystirnar. Í seinastu seks dystunum høvdu tær bert vunnið tveir, men vónirnar at vinna steyoafinaluna vóru tó góðar hjá leikarunum hjá Dratti undan dystinum.

### KÍF fekk góða byrjan

Kvinnurnar úr Kollafirði fingu eina flúgvandi byrjan uppá dystin, og ikki long tíð var gingin, fyrrenn tær høvdu lagt seg á odda heili 8-3. Longu tá valdi Dráttur at taka sítt fyrsta time out, og hetta vísti seg rættiliga at geva úrslit. Leikararnir hjá Drátti kempaðu nú ótrúliga væl fyri at koma innaftur í fyrsta sett, og mitt í settinum megnaðu tær eisini at leggja seg á odda 12-11.

KÍF hevði tó spælt væl í fyrsta setti, og tað var týðiligt, at tær vildu ikki geva skarvin yvir uttan víðari. Við eini stórspælandi Guðrið Syderbø á odda tóku tær aftur leiðsluna, sum settið leið. Tær løgdu seg á odda við fimm stigum, og sjálvt um Dráttur var nær við enn einaferð at fanga KÍF aftur, so var sigurin ongantíð í vanda hjá KÍF í hesum settinum.

### Dráttur svaraði aftur

Í øðrum setti var vent í holuni. Nú var tað brádliga Dráttur, sum fekk eina flúgvandi byrjan, og sum settið leið, øktu tær bara um leiðsluna. Mitt í settinum høvdu tær vunnið seg fram um 14-7, og hetta líktist einum sannførandi sigri til Drátt í øðrum setti.

Dráttur spældi ótrúliga væl hesa løtuna. Tær vóru sterkar í gólvinum, móttøkurnar vóru góður, og so spældu tær ótrúliga fjølbroytt. Serliga Helga Nordendal sló fleiri góðar bóltar beint í gólvið hjá KÍF, men eisini Ruth Thomassen fekk fleiri ferðir bóltin beint ígjøgnum blokkin hjá KÍF.

Blokkurin var eisini ein av stóru trupulleikunum hjá KÍF hetta settið. Tær fingu hann slett ikki at koyra, og ofta gjørdist ov lætt hjá Drátti at sleppa fram við blokkinum.

Móti endanum av øðrum setti tóktist Dráttur taka sær av løttum, og hetta loyvdi KÍF at koma heldur nær. Sigurin kom tó ongantíð í vanda, og Dráttur vann hetta 25-19.

### Gott og fjølbroytt álopsspæl

Í triðja setti fekk KÍF enn einaferð eina flúgvandi byrj-